LM-099/2023

**Annika Petersen**

Fylgiskjal 42

**Fra:** Regin I. Jakobsen <rij@fae.fo>
**Sendt:** 22. februar 2024 15:02
**Til:** VMR-Journal
**Cc:** Journal - Innanhýsis
**Emne:** Viðmerkingar frá Vága Floghavn til uppskotið til ferðavinnulóg

**Til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið**

Yvirskipað vilja vit fyrst av øllum viðmerkja, at tað er at fegnast um, at landsstýrið nú hevur ætlanir um at seta greiðari karmar fyri ferðavinnuvirksemið í Føroyum við nýggja uppskotinum til ferðavinnulóggávu.

Okkara yvirskipaða meting er, at uppskotið til ferðavinnulóg er eitt stórt stig rætta vegin móti eini betri skipaðari og burðardyggari ferðavinnu og taka vit fult undir við endamálsorðingini í § 1 um burðardygga ferðavinnu.

Tað er sum vera man neyðugt støðugt at miða eftir javnvág í atlitum til umhvørvið, vinnuna og upplivingina hjá gestunum, samstundis sum trivnaður um landið verður havdur fyri eygað. Sambært lógaruppskotinum verður tryggjað, at avgerðirnar um, hvussu ferðavinnan skal skipast verða tiknar úti í økjunum, eins og at fígging til at menna undirstøðukervið fyri bæði ferðavinnu og náttúru fylgir við. Í so máta er uppskotið eitt týdningarmikið stig, tó at ikki er væntandi at ætlaða lógin í sjálvum sær fer at føra til burðardygga ferðavinnu.

Tørvur hevur í mong ár verið á kørmum, sum tryggja munagóða náttúruumsiting, samstundis sum teir loyva menning av burðardyggari ferðavinnu. Sjálvsagdur partur av hesum er at tryggja fólki rímiliga atgongd til náttúru okkara. Sjálvsagt skal hetta vera undir ábyrgd og við hóskiligum avmarkingum.

Atgongdin til náttúruna hevur verið stóra avbjóðingin hesi seinastu árini. Tað er vorðið alt meira skilligt, at galdandi jarðarlóggáva als ikki er hóskandi lógarkarmur. Tí er tørvurin á greiðari reglum, sum fyriskriva treytir og rættindi bæði jarðareigarar og gongufólk hava at halda seg til, vorðin støðugt meira átrokandi. Søgurnar eru mangar um óskipað viðurskifti kring landið, tá tað snýr seg um atgongd til náttúruna, um hvussu fólk verða kravd eftir púra órímiligum upphæddum uttan nakra veiting.

Tíverri eru alt ov ofta søgur um tílík viðurskifti at hoyra frá ferðafólki, áðrenn tey fara av landinum aftur, og hevur hetta sera óhepna ávirkan á umdømi Føroya sum ferðamannaland og harvið ferðavinnuna. Á henda hátt leggja vit fót fyri hesi vinnu, sum annars hevur møguleika fyri veruliga at gerast eitt bein afturat samfelagsbúskaparliga. Veruligi spurningurin er tí, um vit politiskt ynskja ferðavinnu, og hava vilja at skipa karmarnar samsvarandi hesum.

Uppskotið til ferðavinnulóg er eftir okkara tykki sum nevnt eitt stig rætta vegin. Eingin ivi er um, at ferðavinnan er ein spírandi vinna í Føroyum, men heldur ikki meira enn tað. Skal hon veruliga røkka nøkrum málum er neyðugt við hóskandi kørmum fyri vinnuligum virksemi. Tað er tí í tøkum tíma, at nakað verður gjørt á hesum økinum.

Ein burðardygg ferðavinna krevur, at arbeitt verður á fleiri mótum. Lógaruppskotið tryggjar grundleggjandi rættindi, nevniliga rættin til at njóta náttúruna og frælsið at flyta seg frítt í Føroyum undir rímiligum treytum og avmarkingum. Sum er hevur almenningurin ikki henda rætt tryggjaðan.

Samstundis sum karmar verða skaptir fyri ferðavinnu er eyðsæð, at jarðareigarar varðveita sín sjálvsagda rætt til landbúnað. Seyðahald er partur av siðaarvi okkara og tætt knýtt at føroyska samleikanum og er sum soleiðis ein týdningarmikil mentunarberi, ið vit eiga at fara væl um. Hesum hevur ferðavinnan avgjørt áhuga í, tí hetta er partur av tí sum eyðkennir okkum og land okkara Eisini er hetta partur av tí, sum ferðandi koma higar at síggja og uppliva, tí hetta er mentan okkara, saman við mati, náttúru og mentanarupplivingum annars.

Eitt avgjørt frambrot við hesum lógaruppskotinum er, at grundleggjandi rættindini hjá almenninginum til lætta og rímiliga atgongd til náttúruna verða tryggjað, samstundis sum tað er við til at skapa karmar fyri eina vinnu, sum veruliga kann fara at blóma.

Ein partur av tí lógaruppskotið letur upp fyri er, at tað nú loksins eigur at bera til at fara undir at gera neyðugar gongurásir. Hesar kunnu síggjast sum undirstøðukervið hjá ferðavinnuni, tí kanningar vísa, at gongufólk í høvuðsheitum halda seg til ræsurnar, um tær eru har, tí tað er avgjørt undantakið heldur enn reglan, at ferðafólk fara aðrar leiðir, um rás er at halda seg til.

Ferðavinna í Føroyum er framvegis á sera lágum stigi. Hesi farnu árini, 2019, 2022 og 2023, tá ferðafólkatalið um Vága Floghavn hevur ligið omanfyri 400.000, hevur talið á turistum, sum komnir eru um flogvøllin, ligið um 60.000-65.000. Um vit taka tey sum koma sjóvegis við er talan um okkurt um 120.000 turistar árliga. Um vit t.d. samanbera hetta við Guernsey, so hava tey omanfyri 400.000 turistar árliga og Guernsey er til støddar sum helvtin av Sandoynni. Um vit hyggja at Bornholm, so hava tey til samanberingar 800.000 vitjandi árliga, og har hava tey 42% av okkara landaøki at hava sínar turistar á. At tosa um hópferðavinnu í Føroyum er tí meiningsleyst.

Tann veruleiki, at Føroyar eru eitt lutfalsliga kostnaðarmikið ferðamál at vitja hevur eisini tað við sær, at talan ikki verður um hópferðavinnu. Fleiri orsøkir eru til at so er; møguleikarnir fyri gisting eru avmarkaðir, og flutningur og aðrir hentleikar eru ikki enn á sama

LM-099/2023

stigi, sum nógva aðrastaðni vit samanbera okkum við. Vit eru í lutfalsliga harðari kapping við okkara grannalond um tey vitjandi. Oftast er talan um náttúrutilvitað ferðafólk, sum koma hendan vegin at uppliva náttúruna, sum avgjørt ikki ynskja at seta spor eftir seg.

Vit síggja fram til, at nýggja lógaruppskotið fer at vera við til at skapa tiltrongdar karmar ferðavinnuni at frama.

Vinarliga / Regards
**Regin I. Jakobsen**

Stjóri / CEO
FAE VÁGA FLOGHAVN
P/F Vága Floghavn
FO-380 Sørvágur

Tlf.: (+298) 35 44 00

rij@fae.fo

This message (e-mail and any attachment) is confidential and is for the intended recipient only. If you are not the intended recipient, please notify us by telephone or return the message immediately and delete the message from your system without making a copy. Any unauthorised use or disclosure of the message is prohibited.